Fra: Anna Rein
Sendt: mikudagur, 2. september 2020 11:00
Til: 'uvmr@uvmr.fo' <uvmr@uvmr.fo>; Herálvur Joensen <HeralvurJ@uvmr.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
Cc: Joanna Djurhuus <JoannaD@uvmr.fo>
Emne: Løgfrøðilig eftirkanning ísv. uppskot til ll. um br. í ll. um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing)

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið,

Løgtingsins umsiting hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing).

Í sambandi við løgfrøðiliga eftirkanning eru hesar viðmerkingar:
Innleiðandi er at viðmerkja, at landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum legði líknandi lógaruppskot fram tann 10. juni 2020, sí løgtingsmál nr. 149/2019.

Í løgfrøðiligu eftirkanningina frá Løgtingsins umsiting til Umhvørvis- og vinnumálaráðið í sambandi við løgtingsmál nr. 149/2019, dagfest 10. juni 2020, varð m.a. viðmerkt: "*Í veruleikanum er ætlanin við hesum lógaruppskoti at fremja broytingar og harvið áseta reglur, ið natúrliga vildu verið reguleraðar í Epidemilógini kapittul 3, (Anordning nr. 655 frá 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltnginger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020), sum er danskt málsøki, sbr. § 1, stk. 2, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini. Tað er tí rættiliga ivasamt, hvørt Løgtingið hevur lóggávuheimild á økinum.*"

Fyriliggjandi uppskot viðvíkur sama heildarspurningi, og er Løgtingsins umsiting av somu fatan, sum við løgtingsmáli nr. 149/2019. Støðan er tískil óbroytt.

Í viðmerkingunum til fyriliggjandi uppskot stendur á síðu 2:
"*Eins og í løgtingsmáli nr. 149/2019 skal Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísa á, at farsóttarlóggávan er danskt málsøki, sbr. § 1, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini. Ásetingar, sum snúgva seg um at forða fyri smittuspjaðing, eiga tískil at verða ásettar í farsóttarlóggávuni og ikki í føroyskari serlóg.*

Lógartænastan hevði í sambandi við lógareftirkanningina av løgtingsmáli nr. 149/2019 hesa viðmerking:

Lógartænastan skal [...] viðmerkja, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er danskt málsøki (regulerað í epidemilógini). Endamálið við epidemilógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. [...]

Lógartænastan skal við hesum vísa á, at tað er ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar, sum beinleiðis hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, soleiðis sum lagt er upp til, av tí at málsøkið er danskt. Harumframt skal viðmerkjast, at tað er ivasamt, um matstovulógin, hvørs endamál yvirskipað er at skipa matstovuvirksemi o.s.fr. í Føroyum, og sum ikki hevur heilsulig ella onnur endamál, er rætta stað at hava eina áseting um at forða fyri smittuspjaðing."

Løgtingsins umsiting vísti á í løgfrøðiligum uppriti í sambandi við løgtingsmál nr. 149/2019, dagfest 12. juni 2020, at:
"Løgtingsins umsiting skal í hesum samanhangi vísa á, at spurningur kann setast við, um uppskotna lógarbroytingin av røttum skal regulerast í matstovulógini ella um hetta eigur at verða regulerað í epidemilógini.

Tað er tó ikki eintýðugt greitt, um talan er um eitt samanfall av lóggávuheimildum, ella um tað í veruleikanum verður regulerað inni á einum felagsøki. Løgtingsins umsiting heldur tó ongan iva vera um, at talan er um eitt markamót, har spurnartekin kann setast við, hvør hevur lóggávuheimildina av uppskotnu broytingini. Hetta kemur eisini týðiliga til sjóndar í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Við markamót verður hugsað um ymisk málsøki, har ábyrgdarbýtið kann umskarast."

Tað er tí rættiliga greitt, at alt bendir á, at bæði Umhvørvis- og vinnumálaráðið, ið er aðalráðið hjá landsstýrismanninum, ið leggur uppskotið fram, Lógartænastan hjá landsstýrinum og Løgtingsins umsiting eru av somu løgfrøðiligu fatan av, at uppskotið hevur avbjóðingar í mun til eitt markamót, hvør hevur lóggávuheimildina av uppskotnu broyting.

Løgfrøðiliga uppritið til løgtingsmál nr. 149/2019: *Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)*, ið umrøður sama heildarspurning sum fyriliggjandi uppskot, er viðfest hesi løgfrøðiligu eftirkanning.

Sum nevnt omanfyri, er Løgtingsins umsiting framvegis av somu fatan sum áður, tí innihaldsliga snýr hetta uppskotið seg um tað sama, sum løgtingsmál nr. 149/2019. Hóast Løgtingsins umsiting hevur víst á somu ivamál og avbjóðingar sum í løgtingsmáli nr. 149/2019, at broytingin átti at verið regulerað í epidemilógini og ikki í matstovulógini, viðgjørdi og samtykti Løgtingið endaliga løgtingsmál nr. 149/2019 tann 26. juni 2020.
Tískil ger Løgtingsins umsiting ikki meira við omanfyri nevndu ivamál.

Umframt omanfyri nevndu yvirskipaðu løgfrøðiligu viðmerkingar, verða lógartøkniligar/innihaldsligar viðmerkingar sendar í serskildum telduposti.

Um tit hava spurningar til omanfyristandandi, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaðu/Løgtingsumsitingina.

Vinaliga / Kind Regards

Anna Rein
Løgfrøðingur / Nevndarskrivari

LØGTINGIÐ

tel. +298 363906 og 215055 • postboks 208

annar@logting.fo logting@logting.fo www.logting.fo